Strí› um kollfir›ingar

Havnar Arbei›smannafelag krevur, at arbei›sfólk í Kollafir›i skulu meldast úr Kollafjar›ar Arbei›arafelag og Føroya Arbei›arafelag og blíva limir í arbei›arafeløgunum í Havn

FAKFELAGSSTRÍ‹

Áki Bertholdsen



Nú Kollafjør›ur kemur uppí Havnina, krevur Karl Johansen eisini, at arbei›smenn í Kollafir›i skulu meldast úr Føroya Arbei›arafelag og innlimast í HavnarArbei›smannafelag

– Nú Kollafjør›ur er komin uppí Havnina, skulu arbei›sfólk í Kollafir›i eisini uppí fakfeløgini í Havn.

Ta› krevur Havnar Arbei›smannafelag nú.

Sostatt hevur samanleggingin ímillum Kollafjar›ar Kommuna og Tórshavnar Kommunu fingi› eitt heldur óvænta› eftirspæl.

Karl Johansen, forma›ur í Havnar Arbei›smannafelag, sigur, at ta› er eitt krav, at nú kommunurnar eru løgd saman, mugu fakfeløgini eisini leggjast saman.

Mánakvøldi› var fundur ímillum Havnar Arbei›smannafelag, Havnar Arbei›skvinnufelag, Kollafjar›ar Arbei›arafelag og Føroya Arbei›arafelag, og har setti Karl Johansen fram kravi› um, at nú kommunurnar ver›a lagdar saman, ver›a kollfir›ingar eisini noyddir til at melda seg uppí feløgini í Havn.

– Annars koma vit í heilum at troka okkum inn á øki› hjá hvørjum ø›rum, og ta› ber ikki til. Ta› skilst, at ein trupulleiki er, at Kollafjar›ar Arbei›arafelag er limur í Føroya Arbei›arafelag. Og hendir ongin broyting, kemur Føroya Arbei›arafelag sostatt at hava limafelag í Tórshavnar Kommunu og hevur samrá›ingarrættin fyri eitt felag í Havn. Og hvat nú, um feløgini í Havn og Føroya Arbei›arafelag fáa ymsar sáttmála, skulu so arbei›sfólk í Tórshavnar Kommuna arbei›a undir ymsum treytum, hóast tey eru í somu kommunu.

Ta› er eisini vanlig mannagongd, at tá i› havnarfólk arbei›a í Kollafir›i, melda tey seg inn í Kollafjar›ar Arbei›arafelag. Og umvent melda kollfir›ingar seg inn í feløgini í Havn, tá i› teir koma til Havnar at arbei›a.

Ein spurningur er, um hetta skal halda fram, tá i› kommunurnar eru lagdar saman 1. januar, at arbei›sfólk í havn og í Kollafir›i skulu noy›ast at melda seg í feløgini hjá hvørjum ø›rum, hóast øll eru í somu kommunu.

Karl ohansen sigur, át á fundinum mánakvøldi› leg›i hann dent á, at ta› er ikki limagjaldinum, sum Havnar Arbei›smannafelag er eftir.

– Vit vilja einans eftir at hava grei› vi›urskifti, sigur hann.

Mugu hava avtalu

Hinvegin er ta› ikki greitt, um Havnar Arbei›skvinnufelag krevur, at arbei›skvinnur í Kollafir›i beinlei›is skulu innlimast í Havnar Arbei›skvinnufelag.

Vígdis Johannesen forkvinna í Havnar Arbei›skvinna sigur, at í øllum førum má ein avtala gerast ímillum Havnar Arbei›skvinnufelag og kollfir›ingar.

Hon sigur, at ein trupulleiki er, at ta› stendur í lógunum fyri Havnar Arbei›skvinnufelag, at felagi› fevnir um Tórshavnar- og Kirkjubøar Kommunu og á n‡ggjárinum kemur eisini Kollafjør›ur uppí Tórshavnar Kommunu.

Vit hava veri› væl nøgdir

Forma›urin í Kollafjar›ar Arbei›arafelag sigur, at ta› er ongin orsøk til, at tey skulu fara úr Føroya Arbei›arafelag og uppí feløgini í Havn bara tí at kommunumarki› er flutt

FAKFELAGSSTRÍ‹

Áki Bertholdsen

- Kollfir›ingar hava fingi› gó›a vi›fer› í Føroya Arbei›arafelag, og eg haldi ikki, at ta› er nøkur orsøk til at broyta ta›. Men ta› sleppa kollfir›ingar sjálvir at taka srø›u til, sigur Hans Madsen, forma›ur í Kollafjar›ar Arbei›arafelag

– Ta› er ongin orsøk til at vit skulu fara úr Føroya Arbei›arafelag og tvingast uppí Havnar Arbei›smannafelag, bara tí at kommunumarki› er flutt.

Ta› heldur Hans Madsen, forma›ur í Kollafjar›ar Arbei›arafelag.

Hann er tí ikki heilt samdur vi› formanninum í Havnar Arbei›smannafelag, sum nú krevur, at kollfir›ingar skulu meldast úr Føroya Arbei›arafelag og skulu innlimast í Havnar Arbei›smannafelag, nú bá›ar kommunurnar ver›a lagdar saman. Sí grein a›rasta›ni í bla›num.

Men Hans Madsen, sigur, at spurningurin um, antin tey skulu fara burturúr Føroya Arbei›arafelag og uppí feløgini í Havn, ver›ur nú lagdur fyri limirnar í Kollafjar›ar Arbei›arafelag.

Sjálvur heldur hann, at ta› skulu a›rar og betri orsøkir til at fara úr Føroya Arbei›arafelag og upp í feløgini í Havn, enn ta›, at kommunumarki› er flutt.

– Vit hava veri› limir í Føroya Arbei›arafelag í eini 60 ár. Har hava vit fingi› gó›a vi›fer› og vit eru væl nøgd vi› limaskapin. Og sjálvur eri eg ímóti at fara uppí feløgini í Havn, tí ta› er ta› ongin orsøk til.

– Men hóast vit eru tvey feløg ber væl til at samstarva.

– Ta› er onki n‡tt, at havnarfólk arbei›a í Kollafir›i og eru limir í Kollafjar›ar Arbei›arafelag íme›an teir eru hjá okkum.

– Somulei›is er ta› heldur onki n‡tt, at kollfir›ingar arbei›a í Havn og eru limir í feløgunum har, so leingi teir eru í Havn. Ta› stendst ongin fløkja av tí, sigur Hans Madsen.

– Um onkur bussførari, ella ein ruskma›ur kemur úr Havn at tøma ruskposarnar í Havn, eru ta› smálutir, sum vit ikki fara at leggja okkum útí.

– Hetta er heldur ikki óvanligt, at fólk fer›ast nógv um kommunumark í sambandi vi› arbei›i, men ta› plagar ikki at elva til trupulleikar, sigur forma›urin í Kollafjar›ar Arbei›arafelag.

Kollfir›ingar hava avger›ina

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag, hevur ikki so nógvar vi›merkingar til máli›.

Hon sigur, at ta› mugu kollfir›ingar sjálvir avgera, um teir vilja halda fram í Kollafjar›ar Arbei›arafelag og í Føroya Arbei›arafelag, ella um teir vilja innlimast í feløgini í Havn.

– Men ta› er sjálvsagt, at vit bakka Kollafjar›ar Arbei›arafelag upp.

Ingeborg sigur, at ta› ber ikki til at tvinga eitt felag til at taka seg sjálvt av og at krevja limirnar uppí eitt anna› felag.

– Hinvegin leg›i Havnar Arbei›skvinnufelag upp til eitt samstarv og ta› ljó›ar dámligari, sigur Ingeborg Vinther

Hon sigur, at ta› eru fleiri dømir um, at fleiri feløg eru í somu kommunu. Eitt nú eru tvey feløg í Runavík, har Klettur og Hæddin er fyri seg. Eisini á Tvøroyri eru fleiri feløg.

– Ta› er ongin grund til fløkjur skulu koma í, um vit fara lagaliga fram og samstarvsvilji er til sta›ar. Ta› ber til at gera avtalur so at ta› slepst undan fløkjum. Men at krevja feløg upployst fremur ikki samstarv, sigur forkvinnan í Føroya Arbei›arafelag.